# Amerada Hess gjørt eitt nýtt oljufund beint við markið




*Á kortinum síggja vit Cambobrunnin fyri norðan. Kelda Dong*

**OLJULEITING**
*Jan Müller*

Oljufelagið Amerada Hess hevur rakt við olju og gass í seinastu boring síni skamt frá føroyska markinum. Hetta veit Sosialurin frá vælvitandi keldum. Talan er um Cambobrunnin, sum Amerada Hess, Dong, Texaco og OMV júst hava borað við boriskipinum West Navion. Brunnurin er nakað norðanfyri verandi oljufeltini Schiehallion og Foinaven og umleið 25 kilometrar frá markinum.

– Orsøk er til bjartskygni eftir at kolvetni er staðfest í brunninum sigur ein kelda við blaðið og leggur hon aftrat, at tað sær gott út. Tað hevur tikið 25 dagar at bora brunnin. Oljan er staðfest á umleið 2800 metrar dýpi. Talan er um eitt sokallað »tight hole« tvs. at ongir upplýsingar verða latnir almenninginum. Tað skilst, at feløgini nú fara at kanna úrslitið nærri fyri at vita, um talan kann verða um at fara undir fleiri boringar til tess at kunna staðfesta um fundin kann verða lønandi.

Cambobrunnurin liggur umleið 30 kilometrar norðan fyri Suilvenfundið, sum varð gjørt fyri nøkrum árum síðani.

Tað kemur væl við hjá oljuvinnuni, at kolvetni nú aftur er staðfest á Atlantsmótinum. Serstakliga aftaná heldur laka úrslitið í avmarkingar- og metingarbrunninum hjá Amerada Hess stutt frá markinum herfyri.

Um talan er um eitt veruligt oljufund kann hetta fáa stóran týdning fyri komandi boringina hjá Agip í føroyskum øki næsta ár. Hóast Cambobrunnurin liggur nakað væl norðan fyri økið, har Agip fer at bora, so kann úrslitið tó gera, at áhugin fyri Agipboringini verður nógv størri. Cambobrunnurin kann so eisini fáa týdning fyri oljufeløg, sum hava 9 ára loyvi. Føroyku megin markið, har Cambobrunnurin er, hevur eitt nú Agip eitt 9-ára loyvi. Tvs. at felagið innan eitt ávíst áramál skal taka støðu til, um tað fer undir at bora har.

Úrslitið av Camboboringini kann eisini fáa týdning fyri eina komandi útbjóðing á føroyskum øki. Tað kann t.d. hugsast, at føroykir myndugleikar vilja hyggja eftir økjunum á landgrunninum nær hesum brunninum og taka tey við í eina komandi útbjóðing.

Sosialurin hevur roynt at fáa viðmerking frá Amerada Hess í Havn og í London. Men har er púra tætt. Einki skal út um boringina sum nú er.




*West Navion, sum hevur funnið olju nær markinum.*



# Krevja sparingar fyri 200 milliónir næsta ár

**Útlit eru fyri hópuppsagnum í stórum stíli hjá teimum alment løntu,tí samgongan hevur givið almennum stovnum boð um at spara fleiri hundrað milliónir næsta ár**

**FÍGGJARLÓGIN**
*Áki Bertholdsen*



*Vandi er fyri umfatandi uppsagnum, víða hvar ímillum tey alment løntu næsta ár. Bæði heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið verða skorin inn á bein, tí samgongan hevur givið boð um umfatandi sparingar komandi ár*

*Tilvildarlig mynd*

Tað verður uttan iva baldrut í Løgtinginum, tá ið fíggjarlógin fyri næsta ár kemur fyri tingið aftur.

Vandi er fyri hópuppsagnum komandi ár hjá teimum alment løntu, tí nú hevur samgongan givið almennum stovnum boð um at fremja umfatandi sparingar næsta ár víða hvar í almennu tænastunum.

Hóast nógvir almennir stovnar frammanundan kæra seg um, at teir hava ov lítið at arbeiða við, hevur samgongan givið teimum ymsu landsstýrismonnunum boð um at spara 200 milliónir næsta ár.

Tað fer at føra nógvar uppsagnir við sær, tí meginparturin av almennu útreiðslunum eru lønir.

Fíggjarnevndin situr í løtuni dag um dag og viðgerð uppskotið hjá Landsstýrinum til fíggjarlóg fyri næsta ár og um einar 14 dagar verður tað lagt fyri tingið aftur.

Ongin fæst til at siga nakað alment um fíggjarlógina fyri næsta ár, nú viðgerðin í fíggjarnevndini ikki er liðug.

Men fíggjarnevndin hevur havt fleiri Landsstýrismenn til hoyringar fyri at tosa um útreiðslustøðið komandi ár.

Og frá vælvitandi keldum veit Sosialurin, at teir hava allir fingið boð um at fremja umfatandi sparingar fyri 200 milliónir komandi ár.

Tað er formaðurin í fíggjarnevndini, Óli Breckmann, sum førir orðið vegna samgonguna og sparingarnar, sum hann hevur givið boð um, fara at raka bæði heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið meint, men tað fer eisini at raka onnur øki.

Soleiðis hevur Páll á Reynatúgvu, sum umsitur almannamál, fingið boð um at spara 90 milliónir, Bill Justinussen, sum umsitur heilsumál, hevur fingið boð um at spara næstan 50 milliónir og Annlis Bjarkhamar, sum umsitur skúlamál og mentamál, hevur fingið boð um at spara 40 milliónir.

Harumframt hevur Jørgen Niclasen fingið at vita, at hann skal spara 15 milliónir á sínum málsøki næsta ár.

### Hópuppsagnir

Nógv tað mesta av almennum útreiðslum er til lønir, so hóast nakað kann sparast á summum økjum, uttan at siga fólki upp, er ongin ivi um, at hesar sparingarnar fara at føra við sær hópuppsagnir víða hvar ímillum almenn starvsfólk.

Vanliga hevur verið sagt, at í miðal ganga fýra starvsfólk upp á hvørja millión.

Skal samgongan so spara 200 milliónir komandi ár, soleiðis sum ætlað, fer tað í ringasta føri at kosta útvið 800 fólkum starvi.

Kanska verða uppsagnirnar eitt sindur færri, verða sparingar funnar á øðrum økjum, men skal sparast, er tað bara í lønum, at tað veruliga munar, so uppsagnirnar verða í øllum førum fleiri hundrað.

Kanska verða tað mangt slíkt, tí nógv hava tríggjar mánaða uppsagnarfreist, ella eitt hálvt ár og sostatt skulu allar sparingarnar fremjast seinasta partin av árinum og og tað merkir, at avleiðingarnar sjálvsagt verða tvífalt so álvfarsligar.

Keldur okkara siga, at sostatt er greitt, at samgongan ætlar at gera álvara burturúr tí, sum varð fráboðað um, at sparast skulu 150- 200 milliónir í almennu umsitingini komandi ár.

Samstundis vísa keldur okkara á, at almenna umsitingin er ógvuliga nógv vaksin seinastu fýra árini.

Ein uppgerð, sum er gjørd í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina, vísir, at nú eru næstan 1.000 fólk fleiri í almennum starvi, enn tað vóru fyri fýra árum síðani.

Her er hugsað um øll tey, sum arbeiða á sjúkrahúsunum, Strandferðsluni og øðrum almennum stovnum.

### Veksa 100 milliónir

Samstundis vísir uppgerðin, at í løtuni eru 330 fulltíðarstørv í sjálvari miðfyrisitingini. Tilsamans skjýtur samgongan upp at játta næstan 138 milliónir til tey ymsu aðalstýrini næsta ár. Í 1998 var játtanin til aðalstýrini slakar 54 milliónir, so har er vøksturin stórur hesi fýra árini.

Eftir uppskotinum hjá Landsstýrinum, veksa lønarútreiðslurnar hja tí almenna smár 100 milliónir komandi ár, so hóast lønirnar eru hækkaðar, boðar tað frá, at starvsfólkatalið er nógv økt.

Her skal tó havast í huga, at tølini kunnu ikki rættiliga samanberast, tí seinastu árini eru fleiri øki løgd undir miðfyrisitingina, sum ikki vóru frammaundan.

Samstundis, sum tað er vaksið í miðfyrisitingini, er tað sostatt minkað aðrastaðni. Men verður alt lagt saman, er talið á almennum starvsfólki vaksið næstan 1.000 fólk hesi seinastu fýra árini, siga keldur okkara.

*Sí eisini greinina "Sita hendur í favn og hyggja at".*

# Sita hendur í favn og hyggja at

**Í fíggjarnevndini sita limirnir hjá samgonguni og royna av øllum alvi at berjast ímóti sínum egnu, men limirnir hjá andstøðuni sita hendur í favn og hyggja, ímeðan teir bíða eftir, hvussu leikur ferð**

**FÍGGJARLÓGIN 2003**
*Áki Bertholdsen*

Tað er stórur spenningur um, hvussu uppskotið til fíggjarlóg fer at síggja út, nú tað kemur aftur úr fíggjarnevndini.

Í øllum førum er tað greitt, at viðgerðin í fíggjarnevndini er rættiliga nógv øðrvísi, enn hon plagar at vera.

Keldur, sum eru inni í málinum, siga fyri Sosialinum, at vanliga plaga tað at vera limirnir hjá andstøðuni í fíggjarnevndini, sum eru teir, sum eru teir ágangandi og royna at pilka uppskotið hjá samgonguni sundur og koma við broytingum og grundgevingum fyri at broyta uppskotið.

Men hesuferð er tað beint øvugt.

–Hesuferð hendir tað merkiliga, at tað eru limirnir hjá samgonguni sjálvari, sum royna at pilka uppskotið hjá sínum teirra Landsstýrið sundur, sigur ein kelda fyri Sosialinum.

Hesuferð er tað samgongan sum kemur við umfatandi ætlanum um broytingar -og tað er fyri tað mesta sparingar, og sum tað sæst í aðrari grein í blaðnum, hevur samgongan givið almennum stovnum boð um at spara 200 milliónir komandi ár.

–Hetta er ein rættiliga margháttlig viðgerð og er í grundini ein staðfesting av tí, sum hevur verið sagt um, at tað er eitt rættiliga ófullfíggjað uppskot, sum Landsstýrið hevur lagt fram og at samgongan langt frá er samd um uppskotið til fíggjarlóg fyri næsta ár.

–Tað tykist sum um samgongan ikki rættiliga veit, hvat hon hevur gjørt og at tað er komin fjáltur á samgongumenn fyri at finna sparingar.

Samstundis situr limirnir hjá andstøðuni fyribils mestsum hendur í favn og eygleiða, hvussu leikur ferð, tí teir síggja tað als ikki sum sína uppgávu at hjálpa samgonguni við sparingum, sum teir í mongum førum halda vera heilt burturvið og órealistiskar.

Keldur vísa á fyri Sosialinum, at nógv tað mesta av almennu útreðslunum eru ásettar við lógum og sáttmálum, ikki minst lønir. Í summum førum eru yvir 80% av útreiðslunum hjá almennum stovnum lønir, so tað er ringt at hugsa sær, hvussu tað skal bera til at spara nakað munandi, uttan at tað fer víttfevndar avleiðingar við hópuppsagnum á nógvum økjum.

– Tað, sum samgongan heldur skuldi havt syrgt fyri, er, at hon skuldi ikki havt latið almennu umsitingini vaksið so nógv, seinastu árini, sum hon er gjørd.

Men nú almenna umsitingin er vaksin so nógv, er ómetaliga trupult at minka hana aftur nakað munandi.

Men ein meting sigur, at Óli Breckmann hevur grundfest ein stóran part av sínum politiska lívi upp á at almenna umsitingin er ov stór.

Og nú hann situr við ábyrgd, sum formaður í fíggjarnevndini, er hann noyddir at halda kósina í hvussu so er at síggja til og at boða frá almennum sparingum í stórum stíli, sama, hvussu órealistiskt tað er, tí hann veit, at Løgtingið helst fer at taka um endan og so gongur hann sjálvur fríur, tí so kann hann siga, at hann royndi, men Løgtingið vildi ikki.

Sí eisini greinina "Krevja sparingar fyri 200 milliónir næsta ár"